# Aladdin á Tórshavnar Skipasmiðju

**Komandi leygardag kl 17 bjóðar GHM til familjukonsert við kendum Disney-løgum**

KONSERT

Familjukonsertin við Harmoniorkestrinum GHM verður í høllini hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Á skránni eru kend løg úr Disney-teknifilmum, sum Laila Carlsen og Jóannes Lamhauge fara at syngja saman við orkestrinum.

Harmoniorkestrið GHM varð stovnað í 1922 og nógv vatn er runnið í ánna síðani tá. Orekstrið telur í dag um 60 spælarar, harav er stórur partur framkomnir musikkskúlanæmingar. Fleiri, sum í dag virka sum tónleikarar og tónleiklærarar í Føroyum og uttanlands, hava traðka sínar barnaskógvar í GHM, nevnast kunnu Atli Petersen,Bjarni Berg, Eirikur Skála, Oddur Hentze, Hans Petur í Brekkunum og Anna E Klett. Hesi bæði seinast nevndu hava í vetur eisini verið solistar við orkestrinum. Afturat hesum hava aðrir tónleikalærarar verið knýttir at orkestrinum, eitt nú hevur Kári Bæk í fleiri umførum verið dirigentur hjá GHM. Eisini nýggjar kreftir eru við til at menna orkestrið og her skal nevnast klarinettlærarin Peder Riis-Jensen sum í vetur, hevur verið drívmegin í orkestrinum.

Hølið har konsertin verður, er heldur sermerkt, men GHM er dámar at royna okkurt nýtt. Tórshavnar Skipasmiðja hevur víst GHM tann vælvilja at lána høllini, sum listafólk brúktu til framsýning seinasta heyst, til konsertina. Hettar kom ikki óvart á, tí Skipasmiðjan hevur í gjøgnum nógv ár verið góður stuðul hjá føroyskum tónleikarum.

GHM hevur í vetur arbeitt í verkætlanum og nógvar frálíkar framførslur hava verið. Skráin til ymisku verkætlaninar hevur verið fjølbroytt, frá klassiskum verkum við Onnu Klett sum solisti, jólatónleiki saman við stórum felagskóri til jazz tónleik við Hans Petur í Brekkunum sum solisti. Konsertirnar hava verið í Tórshavn, á Toftum, í Vestmanna, í Gøtu og í Fuglafirði. Fleiri dirigentar hava eisini staðið fyri orkestrinum, Bernharður Wilkinson, Kári Bæk og Peder Riis Jensen, harafturat hava fleiri tónleikalærarar hjálpt til í ymisku verkætlanunum og her kunnu nevnast Atli Petersen, Bjarni Berg, Eirikur Skála, Katja Volovelskaja, Kjell Orseth, Oddur Hentze, Ólavur Olsen og Edvard N Debess. Fyri GHM hevur tað sera stóran týdning at hesi dugnaligu fólk eru knýtt at orkestrinum og hettar sæst eisini aftur á framførslunum.


*Jóannes Lamhauge og Laila Carlsen Hansen verða solistar á konsertini leygardagin*

Til konsertina leygardagin 22. apríl verða tveir sangsolistar við, Laila Carlsen Hansen og Jóannes Lamhauge.

Laila Carlsen Hansen er fødd inn í tónleikin, øll familjan fæst við tónleik og fyrstu ferð honn sang á fløgu var hon bert 2 ára gomul. Hon hevur síðani tá sungið saman við nógvum tónleikarum, bæði føroyskum og harafturat verið við á eina ørgrynnu av fløgum í nógvum ymiskum samanhangi.

Jóannes Lamhauge kenna vit kanska best frá sangleikinum Jósef, har hann hevði høvuðsleiklutin. Hann hevur seinastu árini verið aktivur á føroyska tónleikapallinum, eitt nú í singer songwriter kappingini 2004, har hann var ein av finalistunum og í kappingini ársins songrødd sum hann vann í 2005.

Bæði hava eina fortíð sum messingblásarar, Jóannes í GHM og Laila í Havnar Hornorkestri, men eru til hetta tiltakið við sum sangsolistar.

Løgini, vit fara at hoyra á konsertini eru m.a. úr filmunum Aladdin, Klokkarin úr Notre Dame og Lion King. Hettar eru vælskrivaði, kend løg, sum bæði børnum og vaksnum dáma, og tí ber til hjá allari familjuni at koma til konsertina, sum varðar í umleið ein tíma.

Stuðla konsertvirkseminum í vetur hava: Tórshavnar Býráð, Tórshavnar Kvøld og Ungdómsskúli, Norðurlandahúsið og Tórshavnar Musikkskúli.


Rúsdrekkasøla Landsins

## Handilslærlingar

Søkt verður eftir 2 handilslærlingum við sergrein innan sølu til sølubúðina í Havn. Sergreinin innan sølu er við serligum denti á vín og spiritus.

Læran umfatar allar tættir í rakstri av einum nútímans handli við denti á sølu, vørukunnleika og kundatænastu.

**Lærlingurin**
Lærlingurin skal hava hug til at nema sær kunnleika og førleika innan økið, sum Rúsdrekkasølan virkar á. Lærlingurin skal vera eldhugaður, initiativríkur og hava ynski um at vera við til at menna virksemið, sum Rúsdrekkasøla Landsins hevur. Lærlingurin skal verða fyrikomandi, álítandi og hava góð samstarvsevni. Eisini skal lærlingurin duga væl at samskifta við onnur og hava ynski um at veita góða tænastu á einum høgum tænastustøði.

Tey ið søkja, skulu hava FHS-, HH-, HF-, Student-, HIF- ella HTX-útbúgving.

**Umsóknarfreist**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Rúsdrekkasølu Landsins í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elsu Mariu Holm Olsen á telefon 31 42 77 ella teldupost emo@rusan.fo.

TEAM85

**Rúsdrekkasøla Landsins**
Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60



## Skrivstovulærlingur

Á skrivstovu okkara er nú møguleiki at fáa eitt lærupláss innan skrivstovuyrkið.

Auto Service er ein av landsins størstu bilasølum og umboðar bilamerkini Opel, Peugeot, Nissan og Saab.

Talan er um eitt fjøllbroytt starv, ið røkkur inn í hvønn krók í fakinum. Skrivstovulærlingurin fær upplæring og innlit í mannagongdir og arbeiðshættir í øllum skrivstovutættum hjá Auto Service.

Skrivstovulærlingurin krevur at vera fyrikomandi og at kunna samstarva við nógv ymisk sløg av fólkum. Stundum eru fleiri bóltar í luftini í senn og tá krevst, at viðkomandi hevur eginleikan at raðfesta. Av fakligum førleika lýkur FHS prógv treytirnar, men HH prógv er ein fyrimunur.

Umsóknir, við viðkomandi prógvum og cv, ið skulu vera okkum í hendi innan 1. mai, skulu sendast til:

Auto Service
Att.: Árni Rasmussen
Við Oyggjarvegin
FO-100 Tórshavn

TEAM85

OPEL PEUGEOT NISSAN SAAB



www.autoservice.fo tel. 345400 Auto Service